




*Pláss er nú fyri nógv fleiri bilum á mekaniska verkstaðnum hjá P/F Meinhardt Arge*

# P/F Meinhardt Arge: Ein nútímans bilverkstaður

**Bilasølan P/F Meinhardt Arge umboðar bilmerkini Nissan, Peugeot, Opel og Saab. Hetta setur stór krøv til verkstað og tænastu. Mekaniski verkstaðurin er nú víðkaður, so samlaða gólvíddin er nú 1095 fermetrar**

**BILVERKSTAÐUR**
*Magnus Gunnarsson*

Stór krøv verða sett til bilverkstaðir í dag. Bilarnir verða alt meira framkomnir, og mekanikararnir mugu dagføra seg alla tíðina. Á bilverkstaðnum hjá P/F Meinhardt Arge er øll útgerð, ið krevst til ein nútímans bilverkstað. Viðskiftafólkini kunnu koma at kanna t.d. bremsur, stoytdoyvarar, møgulig motorbrek, startarar, dynamo, elskipanina, stýriboksir ella hvat tað skal vera. Oljuskift og onnur eftirlit verða eisini gjørd á mekaniska verkstaðnum. Mekaniski verkstaðurin veitir eisini air-condition tænastu, og sum heild verður nógv gjørt burturúr at fylgja við í menningini, ið krevur alsamt størri kunnleika til EDV og ymsar serskipanir, ið finnast í dagsins bilum.

Plátuverkstaðurin er eisini væl útgjørdur, har eru upprættarabonkur og annars øll amboð, ið hoyra til ein nútímans plátuverkstað. Lakkeringsverkstaðurin er útgjørdur við tveimum sproytikabinum.

Fyritøkan er eisini framkomin, tá tað snýr seg um umhvørvisvernd. Lakkverkstaðurin var ein av teimum fyrstu at nýta umhvørvisvinarligt, vatnbaserað lakk.

Starvsfólkini á øllum deildunum hjá P/F Meinhardt Arge verða alla tíðina dagførd, við at tey fara á øll neyðug skeið.

Mekaniski verkstaðurin er nú víðkaður, so samlaða gólvvíddin nú er 1095 fermetrar. Plátuverkstaðurin og lakkeringsverkstaðurin, ið halda til á Hálsi, verða seinni í ár fluttir niðan á Oyggjarvegin.

*Mekaniski verkstaðurin er nú víðkaður, so samlaða gólvvíddin er 1.095 fermetrar*



# Meinhardt Arge letur upp nýggja dekksølu

**Hóast bilasølan, P/F Meinhardt Arge, hevur tradítión fyri at selja dekk, hava teir ikki havt dekk í síni vøruskrá seinastu fimm árini. Óli Arge byrjaði at innflyta Bridgestone dekk beinleiðis úr Japan tíðliga í 60-unum. Nú letur nýggj dekksøla upp við Oyggjarvegin**

**DEKKSØLA**
*Magnus Gunnarsson*

P/F Meinhardt Arge hevur røtur heilt aftur til fyrst í 60-unum, tá Óli Arge, ið seldi fyrsta japanska bilin í Føroyum í 1962, ein Nippon Prince Skyline, byrjaði at innflyta bilar og dekk beinleiðis úr Japan.

Meðan fyritøkan Auto Service helt til í Gundadali, vórðu nógv dekk seld. Tá teir fluttu niðan á Háls og bygdu ein stóran virkisbygning har, bleiv ein annar bygningur bygdur til dekksøluna. Í 1997 keypti Gunnar Justinussen dekksøluna, ið skifti navn til Dekkcentrið. Síðan hevur fyritøkan ikki selt dekk, men nú verður byrjað aftur við dekkmerkjunum Bridgestone, Dayton, Michelin og BF Goodrich. Dekksølan letur upp til 1. mai.



*Erhard Olsen sæst her við dekkmaskinuna á nýggja dekkverkstaðnum hjá P/F Meiinhardt Arge*




# Kvinnur sum mekanikarar



**Á verkstaðnum hjá P/F Meinhardt Arge eru tvær ungar kvinnur í læru sum biltøkningar**

**BILAR OG KVINNUR**
*Magnus Gunnarsson*

Hjá P/F Meinhardt Arge eru tvær ungar kvinnur í læru sum mekanikarar. Hetta má sigast at vera rættuliga sjáldsamt í einum so mansdomineraðum yrki, men tær báðar, Jona Jensen og Elisabeth Henriksen trívast væl í fakinum.

*Jona Jensen og Elisabeth Henriksen, lærlingar hjá P/F Meinhardt Arge*